VIÐMERKINGAR

# Nýtíðargera byggisamtyktirnar í Tórshavnar Kommunu

**Jógvan Arge**
*Formaður í byggi- og býarskipanarnevndini*



Byggisamtyktirnar í Havn eru skipaðar í eina almenna byggisamtykt og sjey serstakar byggisamtyktir. Meginparturin av teimum hava sín uppruna tíðliga í sjeytiárunum, men nógvar ymiskar broytingar eru gjørdar síðani, kanska serliga í teirri almennu byggisamtyktini.

Tað sigur seg sjálvt, at byggissamtyktir trongja til at verða endurskoðaðar, tí tíðin stendur ikki í stað. Tað hevur eisini verið roknað við, at tær fóru at verða endurskoðaðar umleið fimta hvørt ár, men eftir øllum at døma hevur ikki nóg mikið verið gjørt við tað.

Tí hevur Tórshavnar Býráð nú samtykt einmælt at fara undir at endurskoða og nýtíðargera byggisamtyktinar í allari kommununi.

Í fyrstu atløgu verður dentur lagdur á endurskoða almennu byggisamtyktina og serstøku byggisamtyktirnar í miðstaðarøkinum, og seinni verður farið eftir byggisamtyktunum í bygdunum, sum seinastu árini hava lagt saman við Havnar Kommunu.

**Nýbygging í framtíðini**
Eitt endamál við hesi endurskoðan er at stinga út í kortið, hvussu byggjast kann í framtíðini, og hvussu bústaðar-, vinnu- og trivnaðarøki verða løgd til rættis.

Býráðið sigur, at byggisamtyktirnar eiga at innihalda reglur um, hvat er loyvt og hvat ikki er loyvt á grundstykkjum til bústaðir og vinnubygningar o.a. í framtíðini, so byggimyndugleikin ikki í heilum skal taka støðu til prinsipiellar spurningar um frávik frá byggisamtyktunum.

Tað er ongin loyna, at meginparturin av arbeiðnum hjá byggi- og býarskipanarnevndini hesi seinastu árini hevur verið at taka støðu til, um tað, sum antin er ivasamt ella ikki loyvt, skal verða loyvt kortini.

Fastar reglur eru ikki at ganga eftir í slíkum førum, og nevndaravgerðirnar kunnu fara í allar ættir - viðhvørt við rímiligum grundgevingum, viðhvørt máandi grundarlagið undan byggiskipanum.

Nú er ætlanin, at sum mest av slíkum spurningum skula vera avgreiddir í byggisamtyktunum ella øðrum fyriskipanum, áðrenn farið verður undir at byggja á nýggjum útstykkjaðum øki.

**Gomlu býarpartarnir**
Ásannast má, at tað er ikki lætt at umsita gamlar býarpartar eftir somu byggisamtyktum, sum eru galdandi fyri teir nýggju.

Tí er eitt annað endamál við endurskoðanini at gera uppskot um serligar reglur fyri eldri býarpartar soleiðis, at tær fylgja tíðini og tørvinum, samstundis sum tær hava fyrilit fyri eyðkennunum hjá býarpørtunum.

Sum nú er, koma tær galdandi byggisamtyktirnar í gildi fyri gamlar býarpartar, um ætlanin er at broyta húsini. Høkan er bara tann, at hesar byggisamtyktir kunnu vera gjørdar 40-80 ár eftir, at býarparturin var útstykkjaður og bygdur.

Stykkini eru mangan smá, og skula nútíðarmenniskju búgva í húsunum, krevja tey meira pláss. Tað gerst einans við útbygging, men her renna tey seg í byggistig og nettonýtslustig, sum eru ásett eftir nútíðarstykkjum, sum eru dupult so stór ella meir.

Tá er greitt, at borgararnir í heilum langa høvdið í byggisamtyktirnar.

Hetta hóvar ikki altíð saman við ynskinum um, at vit vilja hava fólk, yngri sum eldri, at búgva í teimum eldru býarpørtunum.

Tí fara vit at royna at gera heldur smidligari nýtíðarreglur fyri teir gomlu býarpartarnar, ið bæði taka atlit til trivnaðarmøguleikarnar og eyðkennini hjá hesum býarpørtum.

Eitt annað endamál við hesum grundleggjandi arbeiðnum er at snara dagligu gongdini tann vegin, at byggi- og býarskipanardeildin og -nevndin í størri mun kunnu taka sær av teimum stóru linjunum í býarskipanarmálum heldur enn at sita í støðugum vanda fyri at ganga burtur í smálutum.

# Góðan morgun, kustaskaft

**Beate L. Samuelsen**
*Býráðslimur í Havn*



Tað má sigast at vera ógvuliga ørkymlandi fyri eina kommunu, at býráðslimir á opnum býráðsfundi fáa at vita, at teir ikki kunnu fáa svar uppá settar spurningar har, men mugu bíða eftir tíðindaskrivi, sum sendast skal út til alemnningin dagin eftir.

Har kunnu vit so lesa svarini.

Tað var tað, sum hendi á býráðsfundinum í Havn 26. mai 2005.

Borgarstjórin Heðin Mortensen kundi ella vildi ikki svara undirritaðu uppá, hvør hevði sett arbeiðini í gongd við Høgu- og Lágukai og matstovuinnrættingini í gamla posthúskjallaranum, nær arbeiðini vóru byrjað, hví arbeiðini ikki vóru boðin út, og hví málini fyrst komu til viðgerðar í nevndunum eftir, at farið var í gongd og uttan at pengingurin fyrst var játtaður.

Heldur ikki spurningurin um, hvør fingið hevði arbeiðini, var svaraður á fundinum. Hetta seinasta mátti annars verið tann lættasta sakin av verðini at svarað.

Undirritaða fekk at vita, at alt hetta fór at standa í tíðindaskrivinum, sum sent fór at verða út dagin eftir, og annars var at síggja í innlitinum í teim skjølum, sum ein annar býráðslimur skuldi fáa - eisini dagin eftir býráðsfundin.

Viðv. Havnanevndini og hennara parti av peningajáttanini uppá kr. 800.000, var tó eitt erligt svar givið av samgongliminum Leivur Hansen, Havnanevndarformanni, á hesum sama býráðsfundi, at hann um telefon hevði sett seg í samband við nevndarlimirnar. Tað var hóast alt eitt svar, um ikki nøktandi mannagond fyri mítt viðkomandi, men tó eitt svar frá einum erligum manni, sum vildi standa við tað, sum farið var fram.

Tað kann man ikki siga um borgarstjóran, sum ikki vildi svara spurningunum á býráðsfundinum, men heldur vildi senda fjølmiðlunum teir fyrst.

So hvør flytir býráðsarbeiðið út í fjølmiðlarnar fyrst av okkum báðum, er sólarklárt.

Tað ger Heðin Mortensen. Hann er klárt nr. 1, tá tað kemur til fjølmiðlar.

# Mentanarnátt í Margarinfabrikkini

KONSERT

Mentanarnáttin fríggjakvøldið tann 3-6. kl 21. verður enn eitt brak av eini konsert í Margarinfabrikkini.

Tað er sum vera man ART, Àhugafelag Rokktónleikarana sum stendur fyri tiltakinum.

Sum ein liður í teirra summarskrá er hetta enn ein konsert sum skal gera tað stuttligt hjá ungum í Havn at vera til.

Tað kann sigast at hetta er næstan ein endurtøka av eini konsert sum var fyri tveimum vikum síðani. Men tað ger onki, tí mangar hava áheitaninar á fyrireikaranar verið, um at konsertin varð endurtikin. So her er hon, tó eitt sindur útbygd, soleiðis at hon byrjar við akkustiskum (friðaligum) tónleiki m.a. frá Flóðin og Rólant, kendir frá superbólkunum Deja Vu og Makrel.Teir spæla egin og lánt løg.Stórskaldið úr Sumba Jákup Eli, verður enn eina ferð at hoyra við sínum persónligu og kanska ikki altíð so stovureina teksti.

Seinni parturin er meira rokkutur sum vit kenna stílin frá The Story Ends, Paradox og The Headliners saman við Ineptus og Fólkayvirlitinum klára at rokka the house.

Margarinfabrikkin hevur latið hølið til ART konsertir nú í nøkur ár, og er hetta eitt tað virknasta umhvørvið har nýggjur og originalur føroyskur tónleikur verður framførdur.

Til komandi krúnprinsavitjanina er hølið broytt eitt sindur, so tað verður fyrstu ferð at almenn tónleikaframførsla verður í nýinnrættaða hølinum.

Og um so er, at tað er kalt hetta kvøldið, so ætla tey eisini at bjóða ein heitan munn og kanska onkran bita afturvið.

So sum fyrireikarnir siga:
– Tað skal vera ART Mentan fyri bæði likam og sál. So øll eru vælkomin inn á gólvið í Margarin-fabrikkini, verður sagt í tíðindaskrivi.

## Flaggadagurin á Vaglinum 2005

**Pætur á Borg Eyðunsson**

Flaggdagshaldið endaði heldur ódámliga hendan dagin. Sum vanligt sást danabrók blaktra oman fyri øll tey føroysku fløggini, men eitt nýtt, marghâttligt flagg, eitt sokallað ríkisflagg, varð sýnt fram á flaggdagshaldinum.

Sum áskoðari visti tú ikki rættiliga, hvussu tú skuldi bera teg at eftir lokna talu. Var hetta skemt ella álvara?

Røðarin vildi vera við, at tíðin var farin frá tjóðríkjunum. Løgið, tí seinastu 15 árini eru fleiri tjóðríki komin undan kavi, og onnur munnu fara at koma aftrat!?!

Tú fert at hugsa um Grønland, Thule, íbúðarblokkar og nøkur av heimsins daprastu hagtølum, sum ríkisfelagsskapurin man eiga sín lut í!?! Man hetta vera nakað at samflagga fyri við nýggjum felags flaggi?

Hugurin reikar eisini til frændurnar eystanfyri: 1905, Nansen, sámar o.s.fr. Hugstoytt, nú norðmenn hátíðarhalda síni 100 ár sum tjóðríki!

Hetta sokallaða ríkisflagg varð síðani hongt upp á tjóðlistarsavni okkara. Slíkt kann vist bert henda í Føroyum!?

At Merkið ikki tykist vera við á hesum nýggja flaggi, er kanska ein fyriboðan um, at føroyska fullveldið er nærri, enn vit gruna, sjálvt um hálvveldissamgongan enn ræður fyri borgum!?!